# Lærarastørv í Sankta Frans skúla

**Lýst leys til setanar frá 1. august 2007**

**Søkt verður eftir 8 lærarum**
- trimum lærarum í fast starv, sum eru fulltíðarstørv
- trimum lærarum í tíðaravmarkað starv ská. 2007/08. Størvini eru fulltíðarstørv
- einum lærara í parttíðarstarv, sum er tíðaravmarkað ská. 2007/08 og
- einum lærara fyri lærara, ið hevur barnsburðarfarloyvi.

Tíðaravmarkaðu størvini og parttíðarstarvið eru fyri lærarar, ið hava farloyvi, lækkað tímatal, tímar vegna serligan tørv og at lesa avlopstímar.

**Søkt verður eftir lærarum, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- eru við til áhaldandi at menna skúlan

**Harafturat skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum uppgávum:**
- flokslæraraarbeiði
- undirvísa í gentuítrótti/svimjing
- undirvísa í føroyskum, enskum, donskum og rokning
- undirvísa í tónleiki
- undirvísa í handaligu lærugreinunum

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum, men læraralesandi, ið lúka prógv í summar, kunnu eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verða sett sum sáttmálasett størv. Tó kunnu tey, ið verða sett í fast starv, verða sett sum tænastumenn, um tey frammanundan eru í tænastumannastarvi.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi leygardagin 9. juni 2007 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um størvini hjá Selmar Jacobsen, skúlastjóra, á telefon 302532/220716 ella hjá Jákup Lindberg, varaskúlastjóra, á tlf. 302533/513074.

Í Sankta Frans skúla eru 330 næmingar í forskúla til 7. flokk. Í skúlanum starvast 30 lærarar. Skúlin hevur ein lærarahóp, ið fakliga røkkur víða og arbeitt verður alsamt við at menna skúlan

---

Listafelag Føroya hevur aðalfund leygardagin 23. juni 2007 kl. 17 í Listasavninum. Skrá sambært viðtøkunum. Høvi verður at síggja myndir, sum felagið hevur keypt tey seinastu árini.

**Nevndin**

---

## Stjórnmálafrøðingur

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt útbúgvingar- og granskingarstarv í stjórnmálafrøði leyst at søkja til setan frá 1. september ella skjótast gjørligt. Starvið er tíðaravmarkað til eitt ár.

Útbúgvingarparturin fevnir um fakliga samskipan av undirvísing fyri lesandi, ið taka bachelor-útbúgving í stjórnmálafrøði, og undirvísing í lærugreinum, sum eru partar av útbúgvingini. Útbúgvingin er nærri lýst á **http://www.setur.fo/documents/00496.pdf**

Granskingarparturin verður í stóran mun tengdur at serøki umsøkjarans.

Miðað verður eftir at seta fólk við lektaraførleika í stjórnmálafrøði ella nærskyldum fakøki, men aðrir umsøkjarar eru vælkomnir at søkja.

Løn og starvstreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at seta seg í samband við megindeildarleiðaran Elin Súsannu Jacobsen, teldupostur elinsj@setur.fo ella tlf. 352583.

Umsóknir við ævilýsing (curriculum vitae), próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, serprentum og avritum av vísindaligum verkum mugu vera Fróðskaparsetrinum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2007

Umsóknir skulu stílast til

TEAM85

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Fróðskaparsetur Føroya
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
FO 110 Tórshavn

---

## Avloysarastarv á Fróðskaparsetrinum

Á Føroyamálsdeildini verður at seta avloysari í eitt undirvísingar- og granskingarstarv í norðurlendskari, serliga føroyskari málfrøði frá 1. september 2007 til 31. august 2009.

Starvinum fylgir undirvísingar- og granskingarskylda eftir reglum, ið galda fyri Fróðskaparsetur Føroya. Nærri upplýsingar um nám og starvsskipan fáast á Føroyamálsdeildini, tlf. 352520 ella við at skriva til eivindw@setur.fo

Av umsøkjara krevst, at hann hevur lokið magistaraprógv ella samsvarandi í norrønari málfrøði við føroyskari sergrein. Fyrimun hevur umsøkjari við royndum í staðanavnagransking.

Lønin er sambært sáttmála millum Magistarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við ævilýsing (curriculum vitae), próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, serprentum og avritum av vísindaligum verkum mugu vera Fróðskaparsetrinum í hendi í seinasta lagi 14. juni 2007.

TEAM85

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Fróðskaparsetur Føroya
J. C. Svabos gøtu 14
Postrúm 272
110 Tórshavn

---

# Teknikkari

**Søkt verður eftir teknikara at byrja skjótast gjørligt.**

**Førleikakrøv:**

Fyrimunur er um umsøkjarin er útbúgvin radiomekanikari, radioteknikkari ella hevur líknandi royndir.
Hevur kunnleika til teldur og net.
Kann arbeiða sjálvstøðugt.
Koyrikort er ein treyt.

**Arbeiði umfatar:**

Uppsetan og tænastuveitan av:
Navigatións-, fiskileiti- og samskiftisútgerð og fylgisveinatænastur til skip.

Vikmar
Vestara Bryggja · Postsmoga 3033
110 Tórshavn · Tel. 352182 · info@vikmar.fo
www.vikmar.fo

---

almannastovan

# K U N N G E R Ð
**um hægstu dagpeningaupphædd**

Við heimild í § 9, stk. 2 í »Løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m.« (dagpeningalógin), ger Almannastovan kunnugt:

**§ 1.**
Hægsta dagpeningaupphædd er ásett til kr. 3.746,00 um vikuna íroknað frítíðarløn.

**§ 2.**
Henda kunngerð fær gildi frá 1. mai 2007.

**ALMANNASTOVAN**
hin 29. mai 2009

*Petra J. Joensen (sign.)*
*Almannastjóri*